# Vípan

Kári Lindberg hevur heilt frá 1977 havt Norðoya fruktsølu saman við pápa sínum. Tá ið stóru heilsølurnar kring landið byrjaðu at selja frukt, bleiv tað verri hjá Norðoya fruktsølu at klára seg í kappingini, og tí valdu Kári og pápi hansara at gevast við hesum.

Í fjør keypti Kári so í staðin Vípuna, sum selur at kalla alt til túnið, umframt ymisk sløg av plátum. Við keypinum av Vípuni heldur Kári fram í handilsvinnuni, men tó als ikki við tí sama sum áður.

- Eg havi verið í handilsvinnuni áður, áðrenn eg keypti Vípuna, men hetta er als ikki tað sama. Hetta er ein heilt onnur grein av handilsvinnuni.

Vípan hevur annars eitt stórt úrval av alskyns vørum, sigur Kári Lindberg.

- Vípan hevur eitt stórt úrval av vørum. Her fáast bæði innandura og uttandura flísar, og alt annað, sum hartil hoyrir. Vit selja gassbetong, sum eru plátur úr løttum betongi. Hesar vera ofta brúktar á baðirúminum. Vit hava eisini brotflísar og harragarðssteinar, sum vera brúktir at leggja á túnið.

Karí Lindberg og Vípan hava eisini nógv annnað at fáa. Har eru garður at planta í, og so selur Kári eisini urtagarðspartiklar. Afturat hesum hevur Kári avtalu við MBM-fóður. Hann selur nevniliga tøð, hoyggj, fóður o.a. í Norðoyggjum.




*Kári Lindberg hevur handilin, Vípuna, í Klaksvík. Hann selur at kalla alt til túnið, umframt ymisk sløg av plátum og ymiskt til urtagarðin.*



















